

*Her húsaðist Jógvan Edvard saman við gøtumonnum*



*Foreldrini hjá Jógvan Edvard. Petra og Hans Jacob. Hann var meira enn 50 ár á Bakkafjørðinum*



*Tað var eisini tíð at beistast. Longst t.h. er tað Andreas Eliassen úr Fuglafirði*

hinar bátarnar, so teir koyrdu fulla ferð á móti aldunum. Men tá kavaði báturin, tungur sum hann var, og hann fór at søkka.

Teir vóru tveir mans við bátinum. Nú var støðan hættislig. Bjargingarútgerð var eingin umborð. So teir sóu sær ikki annan møguleika enn at vevja kíkarnar um hondina og so vóna tað besta. Men ólukkutíð fekk Jógvan Edvard ein enda um annað beinið og varð við at verða hálaður niður við bátinum, tá hann sakk. Men í evstu løtu slapp hann leysur og flotnaði upp saman við kíkinum.

Hin báturin ansaði eftir, at nú var knappliga eingin bátur, men bert roykur. Teir í skundi at kvetta línuna, seta boyu á og so at stima. Teir síggja so kíkarnar, og menninir fingust inn í bátin.

Ein íslendskur trolari tók teir umborð og fekk teimum turr klæði og okkurt til matna, so teir komu fyri seg. Báturin, sum Jógvan Edvard misti, var ótryggjaður. Annars hevur hann havt fimm bátar ta tíðina, hann var á Bakkafirði.

## Gott samband millum føroyingar og íslendingar

Umframt mannfólkið, sum var á Bakkafjørðinum, var eisini ein hópur av konufólki, sum gjørdi mat, og sum annars tóku sær av tí húsliga, sum tørvur var á.

Tað var sera gott samband millum føroyingar og íslendingar. Allir íslendingar dugdu føroyskt tá. Tað vildi verið nátturligt, um fleiri pør komu burtur úr. Men Jógvan Edvard veit bert um seg sjálvan, sum fekk konu har frá. Hann fann saman við Esther, dóttir Hjalmar Frederikson. Tey giftust í 1941 og búsettust á Bakkafjørðinum tey fyrstu 9 árini. Síðan fluttu tey til Vestmannaeyjar, har Jógvan Edvard býr enn 94 ára gamal.

Jógvan Edvard hevði eini svág, Hjálmar, sum eg hitti á Bakkafjørðinum í 2003. Men hann er so deyður fyri nøkrum árum síðani.

## Hans Jacob á Brúnni til lands

Ein beiggi Jógvan Edvard var Hans Jacob Hansen, sum var væl kendur fyri sínar gávur á ymiskum økjum. Hann dugdi eisini væl at skriva. Í 1990 gav hann út bókina "Á Brúnni". Í hesi bók er m.a. frásøgn frá "slupptúri" við Norrønu í 1985, tá ferðast varð á Eysturlandinum í Íslandi til pláss, har føroyskir fiskimenn plagdu at koma. Bólkurin var eisini á Bakkafjørðinum, og hetta fekk Hans Jacob at hugleiða um sína egnu tíð "til lands." Vit taka brot úr hansara frásøgn:

Eg minnist, tá eg sum smádrongur gleddi meg, tá ið landmenninir fóru at koma heim. Pápi mín, Hans Jakku, var við øllum brøðrum mínum á Bakkafirði og róði út, og vanligt var, at teir høvdu so nógv ber heimaftur við, summi ár eitt heilt skrín. Børnini plagdu at koma inn til okkara at biðja ber, øll fingu eitt sindur. Eg minist, at har vóru vanlig ber, so vóru eisini bláber og stundum eisini aðalbláber. Tey vóru violett og høvdu ein serligan, góðan smakk.

Vit vóru fleiri smádreingir, sum møttu upp í skúlanum bláir um alt andlitið, men lærarin Reynberg dugdi at taka tað við eini glósu. Skemtandi spurdi hann okkum, um hetta vóru blámenn, sum vóru komnir í skúla.

Fiskin, sum var ov smáur at flekja, høvdu teir eisini heim við, saltaðan heilan í sekkum, og eg visti um fleiri fólk, serliga har sum fiskimenn ikki vóru í húsinum, ið komu um veturin og keyptu henda fiskin til døgurðamat.

## Vaskaði sær eina ferð árliga

Pápi mín bar orð fyri at vera skemtingarsamur og dugdi væl at siga frá. Ein frásøgn var um ein mann á Bakkafjørðinum, sum var kallaður Dabbi. Tað sjáldsama var við hesum manni, at hann sá út sum ein villmaður, tí hann vaskaði sær bara eina ferð um árið. Hetta hendi seinra partin á sumri, meðan føroyingarnir vóru har yviri.

Tá ið hesin Dabbi so var kliptur, rakaður og vaskaður, var hann sum eitt nýtt menniskja, og hann var tiltikin at vera vakur, eingin hevði sæð so vakran mann. Nei, hann var ikki til at kenna aftur. Men tað vardi bara ikki so leingi.

## Eitt strævið lív

Teir gomlu landmenninir høvdu eitt stríggið lív. Peningaliga var mangan fátæksligt, men tað vóru nógv onnur lívsvirði, sum hildu teimum uppi, og sum tíverri verða so lítið mett í dag. Teir vóru ikki so lættir at taka av fótum, um eitt ár fór í hundarnar. Sum til dømis ísárið, hvar ið allur fjørðurin legðist fullur av ísi alt summarið. Teir sluppu ikki út fyrr enn stutt áðrenn, teir skuldu fara heim. Mamma mín segði, at pápi kom heim við 90 krónum.

## Spardu sjálvt teið

Sum unglingi hoyrdi eg einaferð gamla Sjúrð í Fuglafirði siga við pápa, at hann sá tað nú, man var alt ov sparin. Te var ikki skonkt, tað varð bara drukkið vatn. Tað fingust tvey sløg av margarini. Annað slagið var sum vanligt, hitt var ikki etandi. Men hetta margarinið var bíligari, og tí varð tað keypt.

Eitt árið søgdu teir um ein fuglfirðing, at hann skifti ongantíð undirklæði, hann átti eingi at skifti við. Men hann var reinligur alíkavæl. Hvørja ferð, kjansur var, fór hann inn í Hafnará at vaska sær um kroppin. Maðurin segði, at tá ein vaskaði kroppin, nýttist ikki at skifta klæðir.

## Prestur purraði út

Einaferð høvdu vit sett línu inni á fjørðinum. Pápi segði við Benadikt: "Nú fara vit at leggja okkum, tú heldur vakt og vekir okkum, tá línan er staðin."
Ein lítil ond hevur verið henda sólskinsdagin, men tá ið Benadikt sær, at hinir eru sovnaðir, leggur hann seg eisini og letur standa til, og so reka teir inn ímóti landi. Gamli vaknar við, at prestur rópar á teir. Nú vóru teir riknir beint undir Skeggjastaðir kirkju, sum er hinumegin víkina.

## Róðu við árabáti

Eg mann vera yngsti føroyingur, sum hevur róð út í Íslandi við árabáti, tí árabáturin var tá fyri langt síðani niðurlagdur. Vit vóru seks mans, so tað var heldur nógv í einum 8- mannafari, so eg og pápi róðu út við einum gomlum báti, sum hevði ligið uppi í haganum í nógv ár.

Veðurlagið er øðrvísi har enn her. Tað er so kalt um veturin og turt um summarið, at viður rotnar ikki so skjótt. Vit drógu bátin á sjógvin, men hann lak sum eitt sáld. Men so kloyndu vit Sunlight-sápu í hvørja borðrivu, tá gjørdist hann tættur sum kannan.

Fyri tað mesta vóru vit sleipaðir báðar vegir, tá ið vit róðu við snøri, men so stundum fóru vit aðrar leiðir. Tað kom fyri, at vit tveir fiskaðu meira enn hinir fýra. Eg minnist serliga hin eina dagin. Vit kastaðu beint undir húsunum á Bjargi uttanfyri bygdina í Bakkafirði í ein toskastima. Vit fyltu bátin, sjálvt um eg misti loddið í hálvum gekki og mátti fiska við steini.

Ein annan dag, tá nakað var útliðið, settu eg og pápi eina línu eftir hýsu á fjørðinum. Gamli hevði varhugan av, at hýsan var komin, hetta var seinrapart leygardag. Eg kann minnast, hvussu tær nippaðu í línuna, meðan eg setti. Tá eg fór at draga, var bara ein berur húkur á allari línuni, so tað høvdu nógvar hýsur tikið í beran húk, tí eg legði til merkis, at ritan tók nógv øgn av línuni, meðan eg setti.

Føroyskar sluppir vóru altíð tá og keyptu fisk, og hýsa var góð søluvøra á skotska marknaðinum.

Dagin eftir fingu allir bátarnir nógv, men skjótt var, at hýsan minkaði, tí vit vóru so nógvir bátar, einir 30-35. Meg minnist, at Nevið skuldi seta eina línu, sum einki livandi var á. Edvard Skarðsá úr Fuglafirði róði við Nevinum.

Tað vóru nógv ættarfólk hjá teimum á Brúnni í Fuglafirði við á ferðini hjá okkum.